# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### 80 ára føðingardagur

Í dag, 1. september, fyllir Poul Danielsen, Tórshavn 80 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Poul, eru vælkomin í Hornahúsið fríggjadagin 9. september millum kl. 15.00-19.00.

### Dagurin

**1. september.**
**Aigidius**, deyður ár 720.

Hann var ættaður úr Athen og kom sum pílagrímur til Arles í Fraklandi, har hann í einum skógi nærhendis fekk sær einbýli í einari holu. Fólk høvdu við orði, so guðrøkin hann var, og kongur gav honum loyvi til at byggja eitt kleystur. Sjálvur var hann fyrsti abbatin, og eftir deyða hansara vitjaðu pílagrímar næstan líka so nógv í Arles sum í Róm ella Santiago de Compostela.

## Til minnis um Juttu Heinesen

### fødd 31. august 1923

Tá Jutta andaðist 19. juni í ár, var hon næstan 82 ár. Hon giftist við Sigurð Heinesen, lærara úr Leirvík, í 1951 og fingu tey genturnar Sáru og Sigrun.

Tá eg var barn, vóru Jutta og eg grannar á Vágsheygnum. Nøkur ár búðu tey norðuri á Gørðum, men seinri fluttu tey niðan aftur til barnaheimið á Vágsheygnum, har hon kom at passa aldrandi mammu sína, sum var einsamøll.

Í yngri árum var hon í handli úti í Klakksvík, har sum kongligi handilin helt til, og so var hon eisini á skrivstovuni í handlinum hjá "Kal" ( J. Michael Jacobsen).

Seinri árini hava vit kenst best frá Heimavirkinum í Klakksvík, har hon hevur verið ein av berandi kreftunum. Tá Heimavirkið byrjaði, var spátt at tað kom ikki at vera lív lagað meiri enn 10 ár, tí tað mesta av arbeiðinum er sjálvboðið. Tá tað fylti 20 ár, var Jutta so stolt, at hon ordnaði fyri, at vit skuldu hátíðarhalda dagin við veitslu.



Sjálv var hon í handlinum í mong ár, men seinri árini var hon forkvinna í nevndini, líka til fyri einum góðum ári síðani. Jutta hevði nógvar eginleikar, men serliga í tveimum førum. Hon hevði eitt ótrúligt minni og eina sera vakra hondskrift, og so dugdi hon eisini at orða seg og stava, so tað var ein sjálvfylgja, at hon hevði uppgávuna sum skrivari í nevndini.

Jutta gekk sjúk eitt heilt ár við brotnum armi, men hóast tað var hon við til hvønn einasta fund hjá Heimavirkinum. At henni dámdi væl at vera uppií sást, tá vit seinasta heyst funnu uppá at hava køkutombola. Sjálv ringdi hon til limirnar at biðja um vinningar, og fekk hon stóra undirtøku við hesum. Sjálv var hon ein av teimum ídnastu uppi í søluni.

Hetta við at hjálpa og at arbeiða fyri onki hevði hon ikki frá fremmandum. Sigga mamma hennara plagdi at bjóða okkum gentunum inn til sín at gera hondarbeiði til frama fyri ellisheim (nú heimið undir Heygnum). Hetta var í hálvtrýssunum. Sigga stóð og gjørdi brússukur, meðan vit bundu.

Juttu dámdi sera væl at vera har, sum fólk var. Hon spældi bridge, til hon var langt uppi í 70 árunum. Eg spurdi ein av bridgespælaranum, um Jutta dugdi væl at spæla, og, jú, hon dugdi væl. "Amerikanararnir siga, at tann, sum spælir bridge blívur ikki býttur", segði hann. Hon fylgdi væl við í øllum til tað síðsta. Nú hon var sjúk, nakrar vikur áðrenn hon doyði, tosaði eg við eina konu í telefonuni á Heimavirkinum, og spurdi hon eftir Juttu, hvussu hon hevði tað. Eg svaraði, at hon hevði tað ikki so gott. At nú var hon ússalig, men meðan eg standi og sigi hetta, kemur Jutta so fín og hábærslig úr einum bili uttan fyri Heimavirkið og kemur inn í gongina. Tað er skýmligt inni í handlinum, so hon sær meg ikki standa, men eg síggi hana. Hon fer uppá loftið, har sum tey sita og spæla bridge. Har vóru millum annað íslendingar úr Kópavági, meini eg, sum hon hevði verið í Íslandi og spælt bridge saman við.

Nú Jutta er farin, kemur mangt fram frá Vágsheygnum. Tað var so væl ímillum húsini har rundan um, og myndir havi eg, sum Janhild systir hennara hevur tikið á trappuni hjá teimum. Sjálv var eg í brúdleyp hjá Sigurð og Juttu, og síggi eg framvegis hetta vakra og majestetiska parið fyri mær.

Saknurin hjá tykkum døtrunum Sáru og Sigrun eigur at vera stórur, og ikki minni hjá ommubørnunum, sum hon var so góð við. Versynunum var hon so stolt av, og vóru teir eisini so góðir við hana.

Vit á Heimavirkinum vilja minnast hana við tøkk, og ynskja at Harrin skal styrkja tykkum í komandi tíð.

**Maria**

# Ólavur Thomsen 40 ár á Føroya Bjór

Í dag, hósdagin 1. september, eru tað 40 ár síðani, at Ólavur Thomsen varð settur í skrivstovustarv hjá Føroya Bjór í Klaksvík. Alla tíðina síðani 1. september í 1965 hevur Ólavur verið bókhaldari á bryggjarínum og arbeitt saman við fyrst Einari Waag eldra og síðani synum hansara - Einari og Heina Waag.

Hóast Føroya Bjór í dag framleiðir væl meiri, enn teir gjørdu fyri fjøruti árum síðani, so hava teir hildið umsitingina á sama støði. Tað vóru 4-5 fólk á skrivstovuni, tá ið Ólavur kom í starv har, og manningin telur framvegis sama talið. Fyri fjøruti árum síðani var skrivstovan í kjallaranum í sethúsunum hjá Einari Waag. Dánjal Nielsen hevði kontór sunnanfyri lítlu gongina, norðanfyri sótu Anna Petersen, sála, ein genta og Ólavur og innan fyri hjá teimum var skrivstovan hjá Einari.

Tøknfrøðin hevur borið so mangar broytingar við sær. Ikki minst innan brygging og eisini í bókhaldinum. Nógvu tey fyrstu árini eftir, at Ólavur varð settur í starv, varð bókað og fakturerað og lønarútroknað við hond. Í bryggingini hava tøknfrøðisligar tillaðingar støðugt verið gjørdar. Fyri einum 25 árum síðani var Føroya Bjór millum fyrstu fyritøkurnar, sum so spakuliga fór at automatiserað arbeiðsgongdirnar á skrivstovuni, og nú hava teldurnar yvirtikið so ógvuliga nógv. Í 1988 flutti umsitingin niðan um vegin í húsini, har tey framvegis halda til.

Ólavur er partur av býarmyndini. Á súkklu fer hann um morgnarnar av Biskupsstøð, leggur at á Posthúsinum, og so gongur leiðin út á Fornagarðar.

Ólavur Thomsen er klaksvíkingur. Hann er føddur grundlógardag í 1942. Foreldrini vóru Ebba, ættað frammi úr Garði í Svínoy, og Andreas Thomsen, lærari, sum var úr Gøtu. Hann er næstyngstur og eigur fýra systrar - Sólvá og Katrin, sum búgva í Klaksvík, og Torgerð og Marita, sum búgva niðri.



Ólavur vaks upp í grannalagnum hjá gamla Kjølbro, og hann fekk um endan á fjóstíðini hjá Kjølbro. Ólavur var á Købmandshvile háskúlanum veturin 1961-62. Kjølbro heilsølan í tí líkinum, sum hon framvegis er kend, sá dagsins ljós í 1961. Árið eftir fór Ólavur á skrivstovuna har. Umframt heilsøluvirksemi var avgreiðslan hjá Pride og Skipafelagnum undir somu lon, og ábyrgdarmenninir vóru Torry Lindberg og Petur Andreassen, sáli. 1964-65 var Ólavur á Gjaldstovuni, har Steingrím Joensen var leiðari, og seinastu fjøruti árini hevur hann verið á Føroya Bjór.

Inntil fyri ikki so nógvum árum síðani syrgdi Føroya Bjór sjálvt fyri flutninginum av øli og sodavatni millum oyggjarnar. Teir høvdu skip til hetta, sum vórðu nevnd Føroya Bjór. Tað síðsta var gamla Viðoy. Teir plagdu eisini at gera túrar yvir á Reyðafjørðin og til Skotlands eftir lambskroppum og seyðarhøvdum. Ólavur hevur góða sjónátúr, og hann plagdi ofta at vera við á hesum túrunum sum kokkur.

Ivaleyst er Ólavur kring landið best kendur sum verjuspælari á tiltikna 66 liðnum hjá KÍ. Í 1957 byrjaði hann á dreingjaliðnum. Tvey ár seinni royndi hann seg fyrstu ferð á besta liðnum, og har var hann inntil í 1973. Hann bar orð fyri at vera ógvuliga treiskur og skilagóður, og hann var góður í høvuðspælinum. Ólavur spældi seks ferðir á landsliðnum. Fyrsti dysturin var móti Hetlandi í 1963, og tann síðsti var móti Hetlandi í 1969, tá ið Ólavur var liðformaður.

Andreas, pápi Ólav, var ein av forsprákarunum, tá ið Gøtu Ítróttarfelag var stovnað í 1926. Ólavur luttók eisini í nevndararbeiði í KÍ. Umframt í KÍ nevndini var hann eisini limur í serligu nevndini, sum í seksti árunum við John Reid Bjartalíð, sála, sum oddamanni royndi at fáa ítróttarhøllina í Klaksvík bygda. Í sjeyti árunum var hann limur í stadion nevndini hjá býráðnum. Sum drongur og unglingi var hann SNP skóti, og hann hevur eisini verið í Skt. Jørunds gildi.

Í august í 1965 giftist Ólavur við Jancy, fødd Sigurðsson, og ættað úr Klaksvík. Tey eiga fýra døtrar - Elsebeth, Hanna og Ingunn búgva í Klaksvík, og Anja býr niðri. Í frítíðini dámar Ólavi væl at putlast uttanfyri húsini á Kjalarvegi og at vera á floti, og hann er framvegis KÍ stuðul. Hann er innkrevjari, og leygardagar, tá ið abbabørnini umboða felagið hjá honum, telist hann millum teirra, sum fylgja væl við.